**VIÐMERKINGAR**

# Teir borgarligu jarðleggja rækjuvinnuna

**Sverre Midjord**



Tíðirnar broytast, men grundarlagið undir okkara samfelag broytist ikki, fiskivinnan er og verður grundarlagið.

Sjálvstýrisflokkurin umsitur oljumál í Tinganesi við øllum, ið tað kostar. Fimm ár hevur landsstýrismaðurin í oljumálum Eyðun Eltør, sami maður, ið umsitur umhvørvið, og meðan vit bíða eftir oljuni, so mugu vit sanna, at fiskivinna enn er og verður grundarlagið, sum okkara samfelag skal byggja tilveruna á. Vit kunnu ikki siga, at teir ikki kenna til olju og umhvørvi, hon flýtur á Havnavág.

Hvussu nógv lógaruppskot, ið eru komin frá sjálvstýrislandsstýrismanninum hevur verið áhugavert at fingið at vita, so føroya fólk kundi fingið eina meting av, hvussu væl fullveldissamgongan umsitur sína ábyrgd.

Føroya fólk má sanna, at politiskir leiðarar, teir ið hava rygg at taka ábyrgd, teir fækkast. »Man má sno sig«, segði állurin.

Vit hava havt eitt verkfall, ið kundi verið avgreitt uttan at fakfelagsrættindi vildu blivið skerd, tað er altíð ein spurningur um vilja og ábyrgd.

Jóngerð Purkhús vísti hesa ábyrgd, tá hon orsakað av, at byggivinnan var í kreppu, so setti hon tollin og avgjøld av byggitilfari niður frá 33% til 6% fyri at stimbra hesa vinnu. Hvat hevur verandi landsstýrismaður eisini úr Tjóðveldisflokkinum gjørt? Tað er ikki nógv, higartil hevur hann víst til tað, ið fór fram í 80-unum, og tað brúkar hann og Landsstýrið sum undanstøkking.

Tjóðveldisflokkurin umsat eisini fíggjarmál í ringastu niðurgangstíðum. Tann landsstýrismaðurin tordi – hevði rygg.

Fullveldismeldurin heldur fram. Flokkurin, ið segði seg umboða verkafjøldina og hann gjørdi tað, bæði á sjógvi og landi, hann hevur skift ham, hevur lagt seg høgru megin Fólkaflokkin og væl ber til. Kendur tjóðveldislimur sannar hetta og ávarar í blaðgrein vísur Vagnur Michelsen á øll mistøkini, ið gjørd eru, hvussu teir eru drignir eftir oyrunum av Fólkaflokkinum, tað er frá sínum egnu, at ein skal hoyra sannleikan, men Vagnur tosar fyri deyvum oyrum. Sessirnir og maktin eru ov góð at sleppa.

Teir, sum ikki akta harraboð, verða bert settir frá, fyrst var tað Signar á Brúnni. Løgmaður segði, tað var justistmorð, Tjóðveldisflokkurin varð sitandi í samgonguni. Torbjørn var ikki tann rætti, tí hann hugsaði um útjaðaran. Hann visti, at tað var pláss uttanfyri Tórshavn, tað fall ikki í góða jørð.Og til síðst var tað Annlis, ið bleiv sett frá, har var grundarlagið ov veikt, men Tjóðveldisflokkurin tagdi. Høgni Hoydal umsitur tvey landsstýrisøki, tí hann vil vita sikkurt, hvussu støðuføst samgongan er. Innanhýsis ósemjur hava størri týdning at greiða, enn ein vinna, sum er í álvarsligari kreppu. Verður hon slept, tá vendist ikki aftur. Rækjuvinnan hevur ongan góðan í Tinganesi.

Fullveldissamgongan vil heldur gjalda skyldur, ið danska stjórnin hevur yvir fyri Føroyum, enn at stuðla føroyskari fiskivinnu.

Tað er tveir danskir embætismenn limir av verandi Landsstýri. Teir koma ikki at líða nakra neyð, teir fáa sína løn og eftirløn, hvussu við teimum fiskimonnum, ið vera uttan veiðutól og veiðurættindi? Hvør skal gjalda teimum til lívsins uppihald? Verður ikki rækjuflotin bjargaður verður kreppa her á landi.

Nú hevði verið gott at havt 360 milliónir at tikið til, prísurin fyri fullveldispolitikkin kemur at níva.

# Um møguleikar musikkskúlalæraranna til egið spæl - og til stuðul í landsins livandi tónleikalívi

**Ólavur Hátún**



Neyvan nakrantíð hevur hugtakið mentan verið so nógv frammi í skrift og í talu í Føroyum sum hesi seinnu árini, og nú næstseinasta vikuskifti var norðurlendsk ráðstevna um hetta evnið í Norðurlandahúsinum.

Ein táttur í stevnuhaldinum var pallfundur, har umboð fyri ymsar listargreinir høvdu framløgu. Vegna tónlistina hevði Martin Mouritsen, musikkskúlastjóri, orðið, og í sínum tillutaðu 10 minuttum legði hann mesta dentin á professionelt spæl í musikkskúlanum, sum tóktist vera tað, hann helst skuldi at tosa um. Hendan evnisavmarking samsvarar eisini tí hugburði í nýggja mentanarálitinum, at musikkskúlin ikki er at rokna sum mentamál, men sum partur av skúlaverkinum. At binda musikkskúlan soleiðis á bás burtur frá mentanarlívinum annars má metast at vera óheppið, tí tað er millum okkara musikklærarar, at tú finnur teir allarflestu professionellu tónleikarnar í landinum. Hinvegin er tað av størsta týdningi, at alt uppalandi virksemi við børnum og ungfólki hevur best møguligt samband við fólkaskúlan og framhaldsskúlar.

Sum Martin greiddi frá, hava okkara musikklærarar eftir krevjandi upptøkuroynd eina 4-6 ára útbúgving á hægri læristovni aftan fyri seg (krøvini sambært okkara musikkskúlalóg eru hægri, enn tey hava verið í londunum uttan um okkum). Tað er eyðsæð, at hesir framkomnu musikarar, sum í øll hesi ár við fleiri tíma venjing um dagin hava ment sín spæliførleika, og sum koma úr ríkum tónlistarumhvørvum, illa kunnu trívast og støðast, verður ikki tað at spæla sjálvir og vera við í professionellum samanspæli partur av teirra arbeiðsuppgávu. Hesar sømdir eiga musikklærararnir tó ikki bara at fáa til egnan trivnað, heldur mugu vit sum mentað tjóð hava ynskium, at teirra tónleikarapotentiale á besta hátt kemur okkara livandi tónleikalívi til góða.

Høgni Hoydal, verandi landsstýrismaður í mentamálum, kom í sínari røðu í sambandi við setanina av tónleikastevnuni »Summartónar 2003« seinasta týskvøld eisini inná, at nú skuldu útvegir finnast fyri professionellum spæli í Føroyum, og tú fekst ta fatan, at tað helst var Føroya Symfoniorkestur, hann hevði í huga. Føroyingar eru glaðir um og ernir av hesum flaggskipi í okkara tónleikaheimi; men millum musikarnar er tað ongin loynidómur, at FSF, sum er, ikki er nakar støðugt virkandi stovnur, men meira eitt samtak til sertsøk høvi. Her fer onki støðugt virksemi fram, heldur verða bara av og á tikin nøkur upsatøk, har okkara gávuríku ungfólk hava ilt við at fóta sær ímillum tey professionellu, sum fleiri koma uttanífrá eitt nú til nýggjárskonsertirnar og sum nú seinast til 20-ára haldið hjá Norðurlandahúsinum.

Hetta verður sjálvandi ikki skrivað fyri á nakran at seta niður á okkara dúgligu tónleikarar ella orkestrið, sum, tá hesi høvi bjóðast, so dyggiliga sýnir, hvørjar møguleikar vit hava til framkomið spæl í Føroyum. Vit ynskja bara, at orkestrið fær betri umstøður, og at orkesturmanningin skal kunna fáa sømilig kor at virka undir.

Mín áskoðan er, at tað er veruleikafjart at hugsa sær, at landið fer at fíggja t.d. 4-6 spælitímar um vikuna til 30-35 musikklærarar, tí tað hevði kravt meira, enn tað í dag samanlagt verður sett av á kontoina til sang, instrumentalan tónleik og dans.

Fíggjarliga loysnin má tí heldur vera, at nakað meira verður latið í »stóra pott«, heildarveitingina til musikkskúlaskipanina, og at egið spæl kann gerast partur av arbeiðssetningi musikklæraranna.

Ein sameining av undirvísing og útinnandi tónleikavirksemi hjá musikklærarum er vanlig aðrastaðni, og í okkara lítla samfelag er hon so mikið meira ynskilig. Eitt lítið stig tann vegin var ætlað fyri árum síðan, men varð steðgað við tí undanskoti, at tað hevði ikki verið í samsvar við musikkskúlalógina, og at slíkt tí ikki kundi áleggjast kommununum at vera við í. Til tað er bæði at siga, at viðvíkjandi tí peningaliga so hevur landið alt frá byrjan musikkskúlans borið væl størri part av fíggjar-byrðuni, enn heimilað er í hesari sokallaðu studningslóg, og so eisini tað, at møguleikin til egið spæl á tímaætlan læraranna hevði stimbrað tónleikaligt virksemi úti um alt landið, sum er eitt aðalendamál við musikkskúlanum.

Venda vit nú aftur til symfoniorkestrið, so er ongin orsøk til, at tað einans er at hoyra í Norðurlandahúsinum. Føroya Symfoniorkestur er ikki nakar alvi hjá NH, nakað húsaorkestur, sum tað helst skemtiliga verður tikið til. Orkestrið er sprottið av musikkskúlanum, er tí eitt landsins orkestur og átti at verið at hoyrt eisini úti um landið. Ein skipan sum omanfyri lýst hevði kunnað vaksið um virksemið hjá orkestrinum, hevði givið teim framkomnu næmingunum betri høvi til at ment seg sum orkesturmusikarar og hevði kunnað givið tónlistarligt endurljóð ikki bara í høvuðsstaðnum.

Loksins kann verða nevnt, at landsmusikkskúlaleiðarin, sum eisini sjálvur er fastur leiðari av symfoniorkestrinum, fyri góðum tveimum árum síðan setti upp eina ætlan, har hann hugsar sær symfoniorkestrið sett saman av klassisku ljóðførisbólkunum, ið eisini kundu skipast í strúkikvartettir, træblásarakvintett, messingkvintett, kamarorkestur og blandaðar leikbólkar, sum tá samanlagt kundu havt einar hálvthundrað um árið, alment og innan skúlagátttir. Sum symfoniorkestur kundi henda manning tá upparbeitt t.d. tvær skráir í heysthálvuni og tríggjar á vári at framført - bæði á bygd og í býi (hetta seinasta ískoytið er mítt).

Men tað eru ikki orð og ætlanir, men atgerð, ið tørvur er á. Ongin hevur betri innlit og handalag til at fremja og umsita eina ábót í okkara tónleikaheimi sum omanfyri lýst, enn núverandi musikkskúlastjórin Martin Mouritsen. Tað er tí at ynskja eftir, at myndugleikar á økinum geva honum heimild til at gera tað.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



# Lívshættisligt omanlop

**Fríggjamorgunin hendi tað aftur! Ein stórur steinur, sum vigar smá 2 tons rullaði oman á viðareiðisvegin**




*Hesin stóri steinur bóltaði oman á viðareiðisvegin, júst tá fólk vóru á veg til arbeiðis og í skúla*

*Mynd: Poul Reines*

OMANLOP
*Rúna Sivertsen*

Beint eftir, at bussurin við børnunum, sum skuldu í skúla í Klaksvík, var farin framvið fríggjamorgunin, bóltaði ein stórur klettur oman á landsvegin ímillum Viðareiði og Hvannasund. Steinurin var so stórur og tungur, at hann kundi syft bussin við børnunum í havið nógvar favnar niðanfyri.

Javnan rullar grót úr fjallasíðuni oman á landsvegin. Enn hava politikararnir ikki tikið hetta í álvara, men hava raðfest hesa farleið aftarliga, tá hugsað verður um, hvussu vandamikil vegurin er.

Jógvan Nybo, bygdarráðsformaður á Viðareiði, sigur, at bygdarráðið hevur gjørt vart við hetta á rætta staði, men bert hevur fingið tað svar, at eingin peningur er tøkur til at bøta um hetta vandamál.

Bygdarráðsformaðurin visti einki um omanlopið fríggjadagin, fyrrenn Sosialurin ringdi til hansara.

Viðingar halda lítið um, at tey hoyra slík tíðindi sum slatur og ikki verða ávaraði, tá so ógvuslig omanlop hava verið.

### Gera hvat vit kunna

Steinurin slapp ikki at liggja leingi á vegnum, tí menn frá Landsverkfrøðinginum vóru skjótir á staðið og fingu hann burtur.

Finnleif Durhuus, verkfrøðingur hjá LV, sigur, at tað sjálvsagt altíð er gott við upplýsing, men spurningurin er, hvat tú skalt brúka hana til.

Hann sigur, at nógv hevur verið tosað um júst hetta.

- Tað ber til at seta skelti upp, men tey eru fyri at ávara um grót á vegnum. At ávara um omanlop ber illa til, tí tú veitst ikki, hvat og hvussu nógv kann leypa, sigur hann.

### Ganga minst 8 ár

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður er burturstaddur í feriu í løtuni; tí vendu vit okkum til løgmann at spyrja hann, hvørjar ætlanir liggja fyri framman til at bøta um farleiðina til Viðareiðis.

Hann sigur, at tá norðoyatunnilin er liðugur, verður farið undir at gera tunnil úr Ánunum til Norðdeplis. Síðani er ætlanin at gera tunnil úr Hvannasundi inn í Vík og víðari inn í Dalar.

Men hetta eru dýrar íløgur, sum fara at kosta nógvar milljónir, og vit mugu rokna við, at tað fara at ganga í minsta lagi 8 ár, áðrenn ein tryggari farleið verður veruleiki, sigur hann.

# Nýggir maskinsmiðir



*Frá vinstru: Jóni Rasmussen, Skála, Johannes Ólason Jóhannesen, Fuglafirði, Martin Kjærbo, Klaksvík, Anfinn Heðinsson, Klaksvík, Áslakkur Jacobsen, Leirvík, Dávur Kalsø, Klaksvík og Johan Danielsen, Skála*



*Tað er hugaligt, tá prógvið er komið í hús. Áslakkur og genta hansara, Ragna Gøthe, kunnu saktans gleðast, tí um alt gongur væl, verða tey foreldur um fáar vikur. Áslakkur hevur lært hjá Mekanik í Runavík*

**Við einum samlaðum miðaltali, sum lá omanfyri 9, kundu sjey vælnøgdir maskinsmiðir fáa prógv á Tekniska skúla í Klaksvík fríggjadagin**

PRÓGVHANDAN
*Rúna Sivertsen*

Fríggjadagin var hugnaløta á Tekniska Skúla í Klaksvík, tá sjey ungir menn fingu handað sveinabræv sum maskinsmiðir. Umframt sveinabrævið, fingu teir eisini dugnaskapsprógv í motorpassing.

Eftir prógvhandanina varð bjóðað til kaffi og køkur í hugnaligu kantinuni á skúlanum. Bæði næmingar og lærarar hildu røðu, og tað vóru góð og rósandi orð, sum fylgdu teimum sjey, nú teir fingu prógv.

Tekniski skúlin hevur 4 deildir, el-deild, maskindeild, timburdeild og HT-deild.

- Tá fast samband verður millum Norðoyggjar og meginøkið, er Tekniski Skúlin í Klaksvík í eini øðrvísi støðu. Verður tunnilsmunnin við Borðoyavík, sum alt talar fyri, meta vit, at skúlin kemur at liggja ógvuliga strategist.

Við einum breiðum vitanarstøði millum undirvísararnar, liggur í kortinum, at Tekniski Skúlin í Klaksvík verður ein viðkomandi vitanardepil í sínum vinnuøki og fær sær sínar sergreinir í føroyska samfelagnum, stendur millum annað at lesa á spennandi heimasíðuni hjá skúlanum, www.tsk.fo.